# Landsins størsti loppumarknaður

**Leygardagin 4. juni kl. 10-17 skipa SSB-skótarnir og Landssjúkrahúsið fyri einum tí største loppumarknaðinum, sum enn er sæddur, í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum**

LOPPUMARKNAÐUR
*Tíðindaskriv*

Goymslurnar á Landssjúkrahúsinum eru á tremur við ymsum lutum, sum hava hópað seg upp gjøgnum eini 30 ár. Sumt er burturkast. Men nógv er í besta standi, men hóskar ikki til dagsins sjúkrahúsrakstur. Samstundis vantar gulu skótunum í Havn pening til virksemi teirra.

Partarnir hava nú funnið saman í eitt samstarv, sum bøtir um trupulleikarnar hjá báðum pørtum. Skótarnir, t.v.s. leiðarar og foreldur, fara nú í vikuni undir at rudda út úr kjallaragoymslunum undir Landssjúkrahúsinum. Og alt, sum er nakað vert, verður sett til sølu á landsins størsta loppumarknað, sum verður í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum komandi leygardag, tann 4. juni, frá kl. 10.00 til kl. 17.00.

Uppboðssøla verður eisini. Kl. 14.00 leygardagin verða teir mest virðismiklu lutirnir seldir á uppboði.

Talan verður um ein rættiligan familjudag, har foreldrini kunnu gera kvettið, og børnini kunnu hugna sær við hoppiborg, ballónum, pop-corn og candy-floss o.ø., sum skótarnir selja.

Millum tað, sum verður selt, eru bæði lutir, sum kunnu hava áhuga sum minni um farnar tíðir og lutir og tól, sum eru fult nýtilig og hava stórt virði. M.a.:

Rustfríur kølidiskur, 2 næstan nýggj stinkskáp, køksføt og køksíløt í rustfríum stáli, grýtur og pannur, seingjarborð, arkitektalampur, skrivimaskinur, avlagdir sjúkramøblar, avlagdir møblar frá uppihaldsrúmum og skrivstovum, gamlar hurðar úr massivari eik, ein rúgva av postalíni í góðum standi, hyllar og hyllaskipanir, køksmaskinur (s.s. pálegsskerari, kaffikókari o.a.), vask, kranar, kummur, ymiskir gamlir lutir, sum hava verið nýttir til viðgerð og kanningar, t.d. ein persónsvekt av tí gamla slagnum, læknabriksir, metalkrakkar, neyðlyktir, stálbekkin, oyra- og nasasproytur og mangt annað. Ein bilur av merkinum, árgang koyrt km verður eisini seldur á uppboðssøluni.

Yvirskotið verður býtt millum Landssjúkrahúsið og SSB-skótarnar. (Bilurin er tó undantikin, har verður einans inntøkan oman fyri minsta boð býtt.)

# Hetlendskt alibrúk á húsagang

**Kappingin á heimsfevnandi marknaðinum fyri aldan laks er vorðin ov hørð fyri hetlendsku alifyritøkuna Hoove Salmon Ltd., sum júst er farin á húsagang. Tað skrivar The Shetlands News**

ALING

Fólk frá Pricewaterhouse-Coopers eru sett at stýra tí, sum eftir er av fyritøkuni, so kreditorarnir fáa okkurt aftur av tí, teir hava til góðar hjá fyritøkuni, ið nú er farin av knóranum. Málið er at ala fiskin, sum gongur í aliringunum, til hann er klárur at slakta og senda á marknaðin.

Íløgugrunnurin Shetland Development Trust, ið m.a. hevur sett nógvan pening í Smyril Line, hevur mist eina sjeysiffraða upphædd í bretskum pundum, nú Hoove Salmon Ltd. fór.

Hoove Salmon Ltd. var ein av teimum sterku fyritøkunum í samtakinum Shetland Salmon Group og í sølufelagnum SSG Seafoods, sum fór á heysin í 2003. Tá mistu lokalir hetlendskir íleggjarar umleið sjey milliónir bretsk pund.

*Kelda: www.sparikassin.fo*

# 430 mió í nýggjum landskassalánsbrøvum

**Mikudagin 1. juni 2005 gevur Føroya Landsstýri út nýggj lánsbrøv. Upphæddin er 430 mió kr. Lánsbrøvini verða givin út í nýggjari lánsbrævarøð, og er navnrentan 3,5%. Lánstíðin er 5 ár, og verða tey afturgoldin 1. juni 2010.**

LÁNSBRØV

Útgivnu lánsbrøvini verða nýtt til at endurfíggja verandi lánsbrøv, 350 mió kr, sum falla til gjaldingar 24. november 2005, og til avdrátt av láni til danska ríkiskassan, 80 mió kr.

Lánsbrøvini verða noterað á Virðisbrævamarknaði Føroya (VMF)/Iceland Stock Exchange og skrásett á virðisbrævamiðstøðini VP í Danmark.

Landsbanki Føroya og Nordea Bank fyriskipa lánsbrævaútgávuna. Føroya Banki, Føroya Sparikassi, Kaupthing Føroyar og Norðoya Sparikassi eru medfyriskiparar.

Lánsbrøvini eru seld í Føroyum og uttanlands, og kursurin er í dag 27. mai 2005 ásettur til 101,64. Effektiva rentan er 3,14 %, sigur Landsbanki Føroya í tíðindaskrivi.

**el**

Sosialurin
Sosialurin
i




## SMS søkir fíggjarstjóra

**Ættarliðsskifti skal vera í eini av Føroya størstu fyritøkum, samstundis sum virksemið verður økt, SMS verður umbygt og leiðslan styrkt**

**Sunn og sterk fyritøka**
P/F SMS er ein sunn og sterk fyritøka við ein-um eginpeningi uppá góðar 100 mió. kr. Ein føroyskur og ein íslendskur partaeigari eiga 50% hvør.

Høvuðsendamálið hjá P/F SMS er at eiga og reka handlar kring landið, og at standa fyri øllum leigumálunum í Sølumiðstøðini SMS.

Í løtuni eigur fyritøkan hesar níggju handlar: Miklagarð, Hornið, Benetton, Mylnuna, Brotið í Saltangará, og Bónushandlarnar í Havn, í Klaksvík, á Glyvrum og á Tvøroyri. Harumframt eigur fyritøkan matstøðini í SMS, BurgerKing, SunSet og Perluna.

Tilsamans 325 eru í starvi, og handlarnir seldu í fjør fyri 260 mió. kr. uttan MVG.

**Víðkað og vaksandi virksemi**
Eitt annað endamál hjá fyritøkuni er at gera íløgur í virðisbrøv. Vit eru ein av høvuðspartaeigarunum í P/F Fastogn, ið varð stovnað fyri góðum ári síðani. SMS bygningurin er ein av seks bygningum, sum felagið eigur.

Tey seinastu árini hava vit nýtt nógva orku til at vaksa um okkara virksemi, og hesin vøkstur heldur fram. Vit fara um stutta tíð at eiga fleiri handlar, eins og nýggj sølumiðstøð skal standa liðug í 2006.

**Nýggj og sterkari leiðsla**
Tað standa sostatt fleiri stórar avbjóðingar fyri framman. Tí skal leiðslan eisini umskipast og styrkjast. Felagið skal hava eina trímanna stjórn við einum forstjóra, einum fíggjarstjóra og einum býlingastjóra.

Hvør limur í stjórnini fer at hava beinleiðis ábyrgd mótvegis nevndini.

**Nýggjur fíggjarstjóri**
Tað er í hesum sambandi, at vit nú søkja eftir einum fíggjarstjóra — kvinnu ella manni.

Talan er um eitt týðandi og krevjandi starv. Í høvuðsheitum skal fíggjarstjórin standa á odda fyri framtíðar fíggjardeild okkara, har hon/hann skal hava beinleiðis leiðslu av starvsfólkunum og ábyrgdina av øllum tættum innan fíggjarstýring. Harumframt skal hon/hann vera ein natúrligur partur av stjórnini og taka lut á nevndarfundum.

Fíggjarstjórin skal syrgja fyri at alt virkar, og hava evnini at taka neyðug stig, tá tað ikki virkar.

**Vit bíða eftir tí rætta**
Umsøkjarar skulu hava hægri ástøðiliga útbúgving og viðkomandi hollar praktiskar royndir.

Lønin er góð og í samsvari við krøv og ábyrgd. Eftirlønarskipan verður boðin. Er tørvur á tí, kunnu vit eisini hjálpa við at útvega bústað.

Vit vilja hava samband við rætta viðkomandi skjótast gjørligt, men eru til reiðar at bíða við at seta starvið, um tað er neyðugt.

Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu — saman við skjalprógvum — sendast til:

P/F SMS
Att. Hans Mortensen, stjóri
Postboks 1059
110 Tórshavn

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Hans Mortensen á tlf. 31 30 41. Tað ber eisini til í trúnaði at spyrja seg fyri hjá grannskoðara okkara, Árna Ellefsen, grannskoðaravirkið Spekt, tlf. +298 34 34 34

SMS

SMS P/f, á Trapputrøðni, 110 Tórshavn, tel. +298 31 30 41, fax +298 31 74 34, heimasíða: sms.fo